# Fyrsti sáttmálin uppsagdur

Fyrsti sáttmálin hjá einum felag undir Føroya Arbeiðarafelag er nú uppsagdur. Tað er felagið S&K, sum nú hevur sagt sáttmálan upp. Sáttmálin gongur til 31. apríl, men hann skal sigast upp í januar mánaða. Og tað bleiv hann í góðari tí, tí longu týsdagin varð brævið sent við uppsøgnini av sáttmálanun hjá S&K.

Men hetta verður neyvan tann einasti sáttmálin, sum verður uppsagdur.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, ivast ikki í, at sáttmálin ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Arbeiðgevarafelagið um tey tímaløntu, verður eisini uppsagdur. Hann skal verða uppsagdur áðrenn 1. mars.

Annars er Ingeborg Vinther ikki samd í ti, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag bar fram í vikuni um samráðingarnar.

Fyrr í vikuni boðaði Føroya Arbeiðsgevarafelag á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum frá eini semju, sum skuldi vera ímillum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag um samráðingarnar, sum skulu vera í vár.

– Vit hava ikki skrivað undir nakra sum helst semju um, hvussu mannagongdin skal vera í sambandi við samráðingarnar, sigur Ingeborg Vinther.

Tað er serliga ein partur av hesi sokallaðu semjuni, sum Ingeborg Vinther ikki vil kenna til. Tað er brotið um, at partarnir skulu vera samdir um at byrja samráðingarnar tann 13. mars.

– Hatta kenni eg onki til, sigur Ingeborg Vinther. Og tað er púra greitt, at vit fara ikki at samráðast einsamøll, uttan at hini feløgini eisini fara til samráðingar. Vit fara ikki til samráðingar í mars mánaða, um hini feløgini í Klaksvík og og Havn ikki fara til samráðingar fyrrenn í apríl mánaða.

Hon ásannar tó, at Føroya Arbeiðarafelag er samt við arbeiðsgevararnar í, at tað er rætt at leggja krøvini fram í góðari tíð og at byrja samráðingarnar í góðari tíð.

– Vit hava eisini sagt, at vit eru til reiðar at koma til samráðingar í mars mánaða, men so skulu feløgini í Havn og í Klaksvík gera tað sama, sigur Ingeborg Vinther. Men vit hava ikki skrivað undir nakað sum helst, leggur hon dent á.



*Ingeborg Vinther kennur onki til, at Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag skulu hava gjørt eina avtalu um mannagongdina, tá ið farast skal undir samráðingarnar nú í vár*

# Seta hart ímóti hørðum

**Skuldi Havnar Arbeiðsmannafelag funnið uppá sett tiltøk í verk ímóti kollfirðingum, verða arbeiðsmenn úr Havn boykottaðir í øllum landinum, sigur Ingebortg Vinther.**

ÓSEMJA UM ARBEIÐSFÓLK
*Áki Bertholdsen*



*Allar fyritøkur í Havn hava fingið greið boð frá Føroya Arbeiðarafelag um, at setir Havnar arbeiðsmannafelag tiltøk í verk ímóti Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag, verða allir limir í Havnar Arbeiðsmannafelag boykottaðir um alt landið. Tað vil millum annað siga, at tað fer ikki at bera til hjá limum í Havnar Arbeiðsmannafelag at koyra við heilsølubili út á bygd*

– Skuldi Havnar Arbeiðsmannafelag funnið uppá at sett tiltøk í verk ímóti kollfirðingum, verður tað sett hart ímóti hørðum.

Tað sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag er limur í Føroya Arbeiðarafelag. Men nú Kollafjørður kom undir Havnina 1. januar, hevur Havnar Arbeiðsmannafelag kravt, at arbeiðsmenninir í Kollafirði melda seg úr Føroya Arbeiðarafelag og uppí Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann sigur, at tað ber ikki til at hava tvey arbeiðsmannafeløg í somu kommunu. Tað ber heldur ikki til, at arbeiðsmenn í somu kommunu skulu arbeiða undir ymsum sáttmálum, og sostatt eisini undir ymsum treytum - um so er, at tað skuldi hent, at sáttmálarnir verða ymiskir.

Karl Johansen, formaður í Havnar arbeiðsmannafelag, hevur tvær ferðir áður sagt í samrøðu við Sosialin, at tað fer at fáa avleiðingar, um kollfirðingar ikki komu uppí Havnar Arbeiðsmannafelag. Hann nevndi t.d., at tað bleiv trupult hjá arbeiðsmonnum úr Havn at fara til Kollafjarðar eftir ruski, at asfaltera o.s.fr.

Nú er kommunusamanleggingin ímillum Kollafjørð og Havnina veruleiki, men enn hava arbeiðsmenn í Kollafirði ikki meldað seg uppí Havnar Arbeiðsmannafelag og tað ætla teir heldur ikki at gera.

Men enn gongur alt sum vanligt og enn eru ongi tiltøk sett í verk ímóti kollfirðingum.

**Hart ímóti hørðum**

Hendan royndin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag at fáa arbeiðsmenn í Kollafjørði úr Føroya Arbeiðarafelag, er ikki blivin væl móttikin í Føroya Arbeiðarafelag.

Og svarið frá Føroya Arbeiðarafelag er rættiliga ítøkiligt.

– Vit hava givið øllum fyritøkum í Havn greið boð um, at fer Havnar Arbeiðsmannafelag at seta tiltøk í Kollfirðingum, fer Føroya Arbeiðarafelag beinanvegin at svara aftur við at seta tiltøk í verk ímóti limunum í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur Ingeborg Vinther.

– Tað vil t.d. siga, at tað fer ikki at bera til hjá nøkrum limi í Havnar Arbeiðsmannafelag at fara út á bygd at arbeiða, eitt nú at koyra vøru út í handarnar við heilsølubilum.

– Tað vil eisini siga, at øll vøra, og alt annað, sum verður uppskipað í Havn av limunum í Havnar Arbeiðsmannafelag, sleppur ikki at vera ført út á bygd.

– Sostatt fer tað ikki at bera til at lossa vørur í Havn og at koyra hana út á bygdirnar. Øll slík vøra verður innibyrgd í Havnini, sigur Ingeboerg Vinther.

# Fara at krevja meiri í løn

**– Hóast vit hava fingið sjey krónur uppá tímalønina hesi bæði seinastu árini, eru prísirnir hækkaðir so nógv, at keypiorkan er minkað. Samstundis hevur Landsstýrið lagt eyka byrðar á okkum, sigur Ingeborg Vinther**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Áki Bertholdsen*

– Tað er onki at ivast í, at vit fara at krevja meiri í løn, tá ið samráðingar verða við arbeiðsgevararnar í vár.

Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, væntar, at tað verða truplar sáttmálasamráðingar í vár.

Skal sáttmálin ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag sigast upp, skal tað vera áðrenn 1. mars. Enn er hann ikki uppsagdur, men Ingeborg Vinther ivast ikki í, at hann verður uppsagdir.

Og hon sigur, at tað er heldur onki at ivast í, at Føroya Arbeiðarafelag fer at seta fram krøv um lønarhækking á teimum sáttmálasamráðingunum.

–Tað er greitt, at hóast vit hava fingið yvir sjey krónur upp á tímalønina hesi bæði seinastu árini, eru prísirnir hækkaði so nógv, at keypiorkan er minkað. Ikki minst eru oljuprísirnir hækkaðir sera nógv, umframt at sjálvt oljuavgjaldið er hækkað.

– Harumframt ætlar landsstýrið at leggja enn fleiri byrðar á okkum við at álegga okkum at gjalda eini 8-10% av lønini í ein eftirlønargrunn.

– Tí er tað sjálvsagt, at vit fara at krevja meiri í løn, umframt at vit fara at krevja, at arbeiðsgevararnir betala ein part av eftirlønini, sum landsstýrið nú ætlar at leggja á okkum.

Hon sigur, at tað fyri ein part landsstýrinum fyri at takka, at krøv verða sett fram um lønarhækking.

– Landstýrið hevur lagt eyka byrðar á okkum. Og tað kann landsstýrið ikki gera, uttan at rokna við, at vit fara at krevja tað inn aftur. Og vit hava ongastaðni at fara við hesum kravinum, uttan til arbeiðsgevararnar. Tí sjálvt gevur Landsstýrið onki. Tann skattalætti, vit hava fingið, munar púra onki í hesum sambandinum, sigur Ingeborg Vinhter.

Hvussu stór hesi krøvini verða, fær hon onki sagt um enn. Tað fer Føroya Arbeiðarafelag nú at rokna út.



# Orðaskiftið kom ongantíð

**Tá menn tosa um at leggja avgjald á fiskiloyvini, er tað annaðhvørt tí, teir hava misskilt okkurt, ella tí teir ikki vilja í sakligt orðaskifti um uppskotið um fiskidagamarknað, heldur formaðurin í Búskaparráðnum**

FISKIDAGAMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*



*Hermann Oskarssson, búskaparfrøðingur*

Tað hevur ongantíð verið upp á tal at leggja nakað avgjald á fiskiloyvini, sigur Hermann Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum, í viðmerking til tað, Olaf Olsen og Osmund Justinussen, reiðarar, hava sagt í samrøðum við Sosialin um hetta evnið. Eitt avgjald er eitt ávíst, fast gjald, sum lagt verður á eitthvørt. Tað leggur hetta uppskotið als ikki upp til, men til eina uppboðssølu, har keyparin avger prísin.

Hermann Oskarsson sigur, at uppskotið, Búskaparráðið er komið við, er ikki nakað avgjald, men ein marknaður, har fiskidagarnir verða seldir á uppboðssølu. Hann sigur, at uppskotið kom fram, áðrenn hann gjørdist formaður í Búskaparráðnum, men leggur tó dent á, at hann tekur undir við tí.

Hildið hevur verið fram, at uppskotið er ikki brúkandi, tí tað er komið frá fólki, sum ikki hevur skil fyri fiskivinnu.

Til tað sigur formaðurin í Búskaparráðnum, at uppskotið er komið frá búskaparfrøðingum, men við teiri ætlan at fáa eitt sakligt orðaskifti í lag. Eitt orðaskifti, har ikki minst tey, sum dagliga hava við fiskivinnuna at gera, kundu verið við. Men tað orðaskiftið kom ongantíð, og tað harmar Hermann Oskarsson, formann í Búskaparráðnum.

Ætlanin við uppskotinum var ongantíð at seta tað í verk bara soleiðis uttan víðari. Ætlanin var at fáa eitt breitt orðaskifti um tað fyri at vita, um tað yvirhøvur er møguligt at seta tað í verk í praksis. Men tað keðiliga hendi, sigur Hermann Oskarsson, at ávísir partar, vinnulívsmenn og politikkarar, settu seg upp á afturbeinini og boykottaðu uppskotið fullkomuliga uttan at geva tí ein ærligan møguleika.

Hann sigur um prísin á fiskidøgunum, at hann verður tað, sum vinnan sjálv metir seg at kunna klára. Negativur verður hann ongantíð, Tað vil siga, at tað fer ikki at bera til at fáa pengar útgoldnar fyri eitt fiskiloyvi. Men tað kann henda, at prísurin til dømis verður eitt oyra fyri kg., um boðini ikki verða hægri enn tað.

Hugsanin við marknaðinum er, sigur Hermann Oskarsson, at eitt ávíst tíðarskeið verða so og so nógvir dagar bodnir út. So veðrur boðið upp á teir. Eitt reiðarí heldur seg til dømis hava brúk fyri ávísum tali av døgum og bjóðar so. Dagarnir skulu so verða nýttir innan ávíst ásett tíðarskeið.

Hermann Oskarsson er ikki bangin fyri, at tað ikki fer at bera til at umsita eina slíka skipan. Hann vísir á, at Fiskamarknaðurin á Toftum hevur klárað rættiliga væl at umsita uppboðssøluna, og tey kundu til dømis eisini tikið sær av einum fiskidagamarknaði.

Eftir uppskotinum fer tað ikki at bera til at eiga fiskiloyvi um allar ævir, sigur formaðurin í Búskaparráðnum. Tað vil so aftur gera tað, at lættari verður hjá nýggjum fólki at koma inn í fiskivinnuna mótvegis nú, har menn hava sett seg á fiskiloyvini og kunnu handla við teimum fyri egnan vinning, sum teimum lystir.

Jú, ásannar Hermann Oskarsson. Tað kann tykjast eitt sindur møtimikið at fara undir at byggja skip, tá ein ikki veit, um ein hevur nakrar fiskidagar um eini tvey ár. Men ikki heldur hann tað vera so heilt galið kortini. Tann, sum dugir at fáa tað at bera til, eigur ivaleyst eisini at kunna klára seg við teirri nýggju skipanini, um hon kemur. Og gongur tað ikki, so er altso bara ein vegur, og tað er at gevast. Hinvegin hevur tað heldur ikki verið púra óvanligt at leiga skip. Og tað man eisini fara at bera til undir nýggju skipanini, um tað verður brúk fyri tí.

So kann ein, sum keypir fiskidagar, og stendur og manglar eitt skip, leiga sær eitt, sum ongan dag hevur fingið tað ávísa tíðarskeiðið. Akkurát hvussu tað skal avgreiðast í praksis er heldur ikki avgjørt. Tað verður nakað, sum fer at koma, so hvørt støðan vísir seg.

Hvat pengarnir, sum koma inn fyri slíka sølu, skulu brúkast til, hevur heldur eingin gjørt endaliga av enn. Kann vera, sigur Hermann Oskarsson, at teir fara í Búskapargrunnin. Kanska verða teir til ein árligan kekk til allar føroyingar. Ella kanska til okkurt heilt annað. Eisini her er galdandi, at vit enn bara tosa um eitt uppskot, sum ongan veg er komið.

Men aftur eftirlýsir formaðurin í Búskaparráðnum einum breiðum, sakligum orðaskifti um málið.

## Kæran aftur send til ummælis

Kommunuvalið á Eiði er ikki endaliga avgreitt enn. Kæran er nú farin aftur til kæraran til ummælis

Kæran um kommunuvalið á Eiði, sum send varð kommu-nala eftirlitinum í landsstýrinum, er nú endað aftur hjá tí, sum upprunaliga kærdi málið.

Úr kommunala eftirlitinum í Tinganesi verður sagt, at eftir at kæran, sum send varð landsstýrinum, hevur verið hjá valnevndini á Eiði til ummælis, og er hon nú send kæraranum aftur, so hann kann koma við sínum úttalilsum.

Kommunala eftirlitið upplýsir fyri Sosialinum, at valnevndin á Eiði er komin við upplýsingum, sum ikki fyrr hava verið frammi í málinum. Nú hendan nýggja støðan er íkomin, helt eftirlitið tað vera rætt at senda kæraranum kæruna aftur til ummælis einaferð enn.

Kærarin hevur fingið stutta freist til at koma við sínum ummæli. Og tá tað er komið, sigur kommunala eftirlitið, verður endaliga støða tikin til, hvat henda skal við kæruni, sum send er um kommunuvalið á Eiði.

**ej**